Kappingarráðið

Advokatskrivstovan
Postboks 6
FO-110 Tórshavn

**Att: Niels W. Poulsen, adv.**

**Tórshavn, 19. mars 2010**

Okkara journal nr.: 10/00086-8
Viðgjørt: S.R

# Avgerðarskriv

## Samandráttur

Niels W. Poulsen, adv. Hevur við gildi tann 22. februar 2010 boðað frá, at Nema samtakið ætlar at yvirtaka Dimmalætting samtakið.

Raksturin av P/F Dimmalætting hevur í fleiri ár givið munandi hall, og nevndin á Dimmu hevur saman við Eik banka arbeitt fyri at fáa tilført nýggjan eginpening. Í hesum sambandi hevur nevndin samráðst við Nema samtakið um eina møguliga loysn.

Partarnir eru komnir ásamt um eina loysn, ið inniber, at felagið P/f Løkir kemur at eiga allan partapeningin í Dimmalætting samtakinum eftir samanleggingina.

Av tí at árligi umsetningurin í 2009 var omanfyri 75. mió. kr. skal Kappingarráðið taka støðu til, um samanleggingin hindrar virknari kapping, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist sbrt. §15, stk. 1 í kappingarlógini.

Samtøkini hava sítt høvuðsvirksemi á ymiskum marknaðum, men eru á lýsingamarknaðinum umboðað sum veitari og arvtakari. Kappingaretftirlitið metir tí, at viðkomandi marknaður er lýsingamarknaðurin í Føroyum.

Av tí at fyritøkurnar, ið talan eru um, eru ein lýsingarfyritøka og eitt blað, er viðkomandi marknaður skilmarkaður til sølu av lýsingarplássi til lýsingarfyritøkur og størri fyritøkur. Hesar fyritøkur fáa ofta lýsingarpláss til serprís frá bløðunum.

Kappingareftirlitið metir ikki, at samanleggingin millum Nema og Dimmalætting samtaki fer at føra til at virkna kappingin verður hindrað á nøkrum marknaði, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist, sbrt. §15, stk. 1.

Kappingareftirlitið grundar sína støðutakan á, at ongin miðsavning fer fram millum veitarar ella avtakarar. Møguleikin at nýta eina marknaðarráðandi støðu er vanliga til staðar, tá miðsavning fer fram á antin veitara ella avtakarasíðuni. Tað at ein veitari og ein avtakari, nú enda í somu samtøku, er í sær sjálvum ikki ein kappingarligur trupulleiki.

Kappingareftirlitið mælir tí til, at samanleggingin verður góðkend.

## Avgerð

Kappingarráðið hevur avgjørt at góðkenna yvirtøkuna hjá Nema samtakinum av Dimmalætting samtakinum, tí virkna kappingin ikki verður hindrað við tað, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist, sbrt. § 15, stk. 1 í kappingarlógini.

## Málslýsing

Niels W. Poulsen, adv. hevur við gildi tann 22. februar 2010 boðað frá samanlegging millum Nema og Dimmalætting samtakið. § 17. Kappingarráðið skal tí innan 24. mars hava boðað fráboðara frá, um mett verður, at tað er neyðugt at kanna gjøllari kappingarligu ávirkanina av samanleggingini, sbrt. § 17, stk. 1 í kappingarlógini.

Fráboðari upplýsir, at árligi umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum, sbrt. § 2 í kunngerð nr. 9 frá 11. mars 2008 er mió. kr. Sambært § 14, stk. 2, nr. 3 skal samanleggingin tí viðgerast eftir § 15 í kappingarlógini.

Eftir § 15, stk. 1 í kappingarlógini metir Kappingarráðið, um ein samanlegging kann hindra virknari kapping, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist. Um Kappingarráðið kemur til ta niðurstøðu, at slík støða verður skapt ella styrkist, kann Kappingarráðið ógilda eina slíka samanlegging, sbrt. §15, stk. 1.

Ístaðin fyri at ógilda samanleggingina kann Kappingarráðið velja at góðkenna eina samanlegging við treyt, sbrt. §15, stk. 2.

## Fyritøkurnar

P/f Løkir er íløgufelag, ið P/f Føroya Banki, P/f Krúnborg, P/f Tjaldur og Lækir Capital ehf eiga. Felagið hevði í 2008 eitt hall á 10,6 mió. kr. ímóti einum yvirskoti á 7,5 mió. kr. í 2007. Í 2008 vóru samlaðu ognirnar 85 mió. kr. og eginpeningurin var 75,5 mió. kr.




P/f Nema hevur virksemi innan sølu av skrivstovuútgerð, telduútgerð, skrivstovu- og sniðinnbúgv og skeiðsveitingum. P/f Nema hevði hall í 2008 á 15,9 mió. kr. ímóti einum yvirskoti í 2007 á 15,3 mió. kr. Í 2008 vóru samlaðu ognirnar 112 mió. kr. og eginpeningurin var 54,6 mió. kr.

P/f Sendistovan veitir tænastur innan marknaðarføring generelt, herundir umsiting av lýsingarmiðlum. P/f Sendistovan hevði eitt yvirskot í 2008 á 1,1 mió. kr. ímóti 225 t.kr. í 2007. Í 2008 vóru samlaðu ognirnar 13,3 mió. kr. og eginpeningurin var 2,7 mió. kr.

Dóttirfelagið Sp/f Atlantstøkni veitir tænastur innan KT, herundir ráðgeving, menning og tillaging av skipanum. Sp/f Atlantstøkni hevði eitt yvirskot í 2008 á 318 t.kr. ímóti 697 t.kr. í 2007. Í 2008 vóru samlaðu ognirnar 6,1 mió. kr. og eginpeningurin var 977 t.kr.

P/f Dimmalætting er móðurfelag í samtakinum og partaeigararnir eru Lisbeth L. Petersen og Beate L. Samuelsen.




Virksemið hjá P/f Dimmalætting fevnir um útgávu av Dimmalætting og Skipalistanum, rakstur av heimasíðu og sølu av charterferðum. P/f Dimmalætting hevði eitt hall í 2008 á 25,5 mió. kr. ímóti einum halli á 218 t.kr. Í 2008 vóru samlaðu ognirnar 23 mió. kr. og eginpeningurin var 1,1 mió. kr.

P/f Prentmiðstøðin veitir tænastur innan blaðrotatiónsprent og útbering. P/f Prentmiðstøðin hevði í 2008 eitt yvirskot á 2,7 mió. kr. ímóti 3,5 mió. kr. Samlaðu ognirnar vóru 18,8 mió. kr. og eginpeningurin var 10,9 mió. kr.

Sp/f Peba rekur portalin www.bil.fo, ið miðlar umvegis alnótina keyp og sølu av bilum. Onki virksemi hevur verið í Sp/f Peba seinastu tvey árini.

P/f Føroya Prent veitir tænastur innan offsett prent og sniðgeving. P/f Dimmalætting og P/f Hestoy eiga hvør 50% av partapeninginum. P/f Føroya Prent hevði eitt yvirskot í 2008 á 84 t.kr. ímóti einum yvirskoti á 30 t.kr. Í 2008 vóru samlaðu ognirnar 27,7 mió. kr. og eginpeningurin var 6,4 mió. kr.

Fráboðari upplýsir, at samlaði umsetningurin hjá samtøkunum er omanfyri 75 mió. kr., og tí skal samanleggingin metast eftir ásetingunum í § 15 í kappingarlógini, sbrt. § 14, stk. 2, nr. 3.

## Viðkomandi marknaður

Fráboðari metir viðkomandi markna at verða lýsingarmarknaðurin og nevnir fylgjandi aktørar á marknaðinum:

Útvarp Føroya, Sjónvarp Føroya, Lindin, Rás 2, útlendskar sjónvarpsrásir, útlendsk útvarp, Dimmalætting, Sosialurin/Olivant, Norðlýsið, Suðurrás, Oyggjatíðindi, Trúboðin, Børsen, Jyllandsposten, Berlingske Tidende, Politikken, BT, Ekstrabladet, Kvinna,Lýsingarbløð av ymiskum slag (ítróttarfeløg, KFUM, skúlaklassar o.l.), Útlendsk vikubløð (Se&Hør o.l),Ein long røð av heimasíðum við ymiskum undirhaldi og tíðindum, sum kappast um lesara og lýsara.

Kappingareftirlitið metir, at henda skilmarking er ov breið, og at viðkomandi markaður skal skilmarkast til engros sølu av lýsingarplássi í føroysku bløðunum og heimasíðum til lýsingarstovur og størri fyritøkur. Viðkomandi vøra er sostatt lýsingarpláss í føroysku bløðunum.

Orsøkin til at mett verður ikki, at viðkomandi marknaður er allur lýsingarmarknaðurin, er at samtøkini einans eru umboðað av P/f Sendistovuni og P/f Dimmalætting á sama marknaði. T.v.s. við P/f Sendirstovuni sum keypara og P/f Dimmalætting sum seljara av lýsingarplássi.

Lýsingarfyritøkur sum P/f Sendistovan keypa vegna kundan lýsingarpláss. Av tí at lýsingarstovur umboða fleiri lýsarar, fáa tær lýsingarpláss til engros prísir. Størri fyritøkur sum t.d. bankar, tryggingarfeløg og stórhandlar lýsa so tíðan, at tær eins og lýsingarfyritøkurnar fáa lýsingarplássi til engros prís.

Kappingareftirlitið metir, tí at rætta skilmarkingin er marknaðurin fyri engros sølu av lýsingarplássi í tíðindabløðunum til lýsingarstovur og størri fyritøkur. Landafrøðiligur marknaðurin er Føroyar.

## Meting

Avleiðingin fyri kappingina á viðkomandi marknað er, at ein av stóru framleiðarunum av lýsingum, Sendistovan, og ein av stóru seljarum á lýsingarplássi, Dimmalætting, enda í sama samtakið.

Ivasemi hesum viðvíkjandi kundi verið, at Nema samtakið fær møguleika at hindra, avmarkað ella á annan hátt at avlagað kappingina millum lýsingarfyritøkur á føroyska marknaðinum.

Fráboðarin metir tó ikki, at hetta er sannlíkt. Ein lýsingarfyritøka livir av at ráðgeva og framleiða lýsingar til lýsarar. Endamálið við øllum virkseminum hjá lýsingarfyritøkuni er at skapa eina eksponering fyri kundan, ið førir til eina nøktandi meirsølu.

Um lýsingarfyritøkan ráðgevur einans við tí fyri eyga at flyta lýsarar til ávísan lýsingarmiðil, so vil hetta skaða eksponeringina hjá kundanum og ikki føra til nøktandi meirsølu. Henda framferð vil í síðsta enda skaða lýsingarfyritøkuna.

Kappingareftirlitið tekur undir við sjónarmiðinum hjá fráboðara og metir ikki, at Nema samtakið eftir samanleggingina fer at kunna hindra, avmarkað ella á annan hátt at avlaga kappingina millum lýsingarfyritøkur á føroyska marknaðinum.

Somuleiðis er ikki talan um eina yvirtøku sum førir við sær, at miðsavning fer fram á veitara ella avtakara síðuni. Yvirtøkan førir við sær at ein veitari og ein avtakari enda í somu samtøku. Tað er serliga tá miðsavningin fer fram antin á veitara síðuni ella avtakara síðuni, at kappingarligir trupulleikar kunnu stinga seg upp.

Kappingareftirlitið metir ikki, at henda samanlegging gevur P/f Nema møguleika, at hindra virknari kapping.

## Niðurstøða

Kappingarráðið metir ikki, at samanleggingin millum Nema samtakið og Dimmalætting samtakið, kann hindra kappingini, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.
Kappingarráðið mælir tí til at góðkenna samanleggingina.

### *Kæruvegleiðing*

Henda avgerð kann kærast til Vinnukærunevndina sambært § 27, stk. 1 í kappingarlógini. Kæra um avgerð skal verða løgd fyri Vinnukærunevndina innan 4 víkur frá tí, at avgerðin er kunngjørd tí, sum hon viðvíkur, sbrt. §28, stk. 2 í kappingarlógini.

Víst verður annars til kapittil 8 í kappingarlógini.

Vegna Kappingarráðið

Ingunn Ó. Eiriksdóttir
formaður

/Terje Sigurðsson
deildarstjóri